# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# TEY VEIKU VERÐA OFRAÐ

Leygardagin var altjóða arbeiðaradagurin hildin kring heimin, eins og hann hevur verið hildin seinastu stórthundrað árini, síðani Socialistiski Internationali í 1889 ásetti hendan dagin til stríðsdagin hjá arbeiðararørsluni – 100 ára dagin eftir fronsku kollveltingina.

Vit kunnu ikki siga, at føroyska verkafólkið heldur dagin sum stríðsdag sum so. Dagurin er meira ein frídagur enn ein stríðsdagur, men á hvørjum ári skipar Havnar Arbeiðsmannafelag fyri fundi á Vaglinum í Havn, sum Kringvarpið sendir beinleiðis. Har hoyra vit fakfelagsfólk halda røðu saman við onkrum gestarøðara, meðan Havnar Hornorkestur spælir ymsar arbeiðarasangir.

Hesaferð vóru røðararnir Ingeborg Vinther, sum í vikuni kundi hátíðarhalda 30 ára dagin sum forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, Vígdis Johannesen, sum í nógv ár hevur verið forkvinna í Havnar Arbeiðsmannafelag – og so Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, sum fyri kortum gjørdi eina miseydnaða roynd at taka dupultar lønir frá politikarum.

Í øðrum londum fræmaking um vikuskiftið, at 1. maidagshaldini hava gingið meira harðliga fyri seg. Fíggjarkreppan ger um seg, og tað var eitt nógv umrøtt evni. Tað sum vit kanska kunnu sakna í føroyska kjakinum er, at fakfeløg og politiska skipanin duga betur at samskifta – og taka hendur saman við konstruktivum dialogi heldur enn tað nógva keglið, sum ofta er at hoyra – helst tí, at politiska skipanini ikki tekur fakfeløgini í nóg stórum álvara.

Tað er so sjálvsagt, at ein slíkur dagur verður nýttur til at seta fram krøv um løn, um javnstøðu, um fólkaræðisligar ábøtur og ikki minst til at minna á mannarættindi og samhaldsfesti.

Tað er tó ein veruleiki, sum Ingeborg Vinther eisini vísti á, at nógv tann størsti parturin av teimum arbeiðsleysu í dag eru tey ófaklærdu – júst tann bólkurin, sum sum eigur stríðsdagin.

Fyri sekstan árum síðani skipaðu



fakfelagsfólk seg við sínum egna politiska flokki og fingu ávirkan. Hetta eydnaðist tó ikki væl. Aðrastaðni fylkist fakfelagsrørslan gjøgnum politisku flokkarnar á vinstraveingInum, men í Føroyum er slíkt formaliserað samband bæði óhugsandi og ómøguligt – vit duga ikki altíð so væl ta demokratisku prosessina?

Boðskapurin frá arbeiðararørsluni er tó vælgrundaður: At tað er eitt krav mótvegis politiska myndugleikanum, at stýrt verður soleiðis, at tað ikki verða tey veikastu, sum verða ofrað í teirri sokallaðu fíggjarkreppuni. Men tað verða tey kortini – og tað púra tilvitað!

## Tey veiku verða tilvitað ofrað í kreppuni



# Gott flogsamband tryggjar búskaparvøkstur

Dansk Industri hevur kannað, hvørja ávirkan gott flogsamband hevur til tess at tryggja vøkstur.

Kjakið um týdningin av góðum og regluligum flogsambandi er íkomið eftir stóru trupulleikarnar í sambandi við øskuna úr eldgosinum í Íslandi.

Royndir úr Stóra Bretlandi vísa, at 10% betri flogsamband økir um framleiðsluna upp á longri sikt út við eitt prosent. Somuleiðis hevur hetta serliga stóran týdning fyri lond, sum hava nógvan samhandil við útheimin.

Tá stórar altjóða fyritøkur skulu taka støðu til, hvar tey skulu staðseta fyritøkur, er flutningssambandið avgerandi. Í árligu kanningini, European Cities Monitor, har 500 vinnulívsfólk meta um avgerandi viðurskifti í sambandi við staðseting av fyritøkum, svara millum 45 og 61% - alt eftir vinnugrein – at flutningssambandið við aðrar býir í landinum og aðrar býir í øðrum londum er avgerandi. Upp á spurningin, hvørjir býir í Evropa eru bestir at staðseta fyritøkur í, er svarið heilt greitt, at altjóða flutningssambandið frá býnum hevur størstan týdning, og tað er London, sum flest velja, sum bestu staðsetingina.

*(Kelda: www.industry.fo/www.di.dk)*

*eirikur@sosialurin.fo*



## Avlýsa barnakonsertir

BERNHARÐUR WILKINSON
KJAK Á SÍÐU 10



## Blokkurin má tiðnast upp

MARIUS DAM
KJAK Á SÍÐU 13

# Tað almenna skal halda avtalur

Løgtingsmenn halda, at tað er sera óheppið fyri trúvirðið hjá tí almenna, at avtalur, sum almennir stovnar gera, ikki verða hildnar. Tá ein almennur stovnur ger eina avtalu við annan part, ger hann avtaluna vegna landsstýrið og løgtingið, og tí er tað stak óheppið, um slíkar avtalur ikki verða hildnar. Tað vóru løgtingsmenn á einum máli um, tá Løgtingið hósdagin viðgjørdi ein fyrispurning um bakkaverju í Fámjin. Í fyrispurninginum vísti Torbjørn Jacobsen á, at Landsverk hevði gjørt avtalu við fámjiningar um at gera bakkaverju, men at eingin verja er komin enn. Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, ásannaði, at avtalur, sum almennir stovnar gera, skulu haldast. Hon segði, at hon hevði roynt at fáa pening játtaðan til bakkaverjuna í Fámjin, men higartil til fánýtis. Bakkaverjan í Fámjin er mett at kosta eina millión krónur at gera. Fámjiningar reistu málið á fyrsta sinni í 1984.

*arni@sosialurin.fo*



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*